

*Tveir bilar stoyttu saman í Skálfirði sunnudagin. Annar teirra mól runt á vegnum og endaði í veitini. Kranabilur mátti til fyri at fáa bilin uppaftur*

**Mynd: Sveinur Tróndarson**

# Rendi á og fór útav

*Tveir bilar rendu saman í Skálafirði sunnudagin. Eingin fólkaskaði var, men annar bilurin mól á vegnum og fór niðanav*

Sveinur Tróndarson

Tað var sera hált um vikuskiftið, nú kavin fall og kuldin legði seg um landi.

Fleiri ferðsluóhapp hava verið um vikuskiftið og hóast talan í nógvum førum er um royndar bilførarar, so hevur hálkan tikið teir á bóli kortini.

Í Skálafirði stoyttu tveir bilar saman.

Annar bilurin var á veg út á vegin, men rendi inn í síðuna á einum øðrum bili, sum kom koyrandi inneftir.

Men ikki nóg mikið við tí. Aftaná samanstoytin mól annar bilurin runt á vegnum og endaði við at fara niðan av vegnum.

Tað var ikki hugsingur um at fáa bilin uppaftur av egnari megi, og tí mátti kranabilur til. Bilurin varð lyftur upp aftur seinni sunnukvøldið.

Løgreglan í Runavík sigur, at talan var um eitt óhapp av tí slagnum, sum altíð henda í hálkuni.

Tvey onnur óhapp hendu eisini í Eysturoynni um vikuskiftið, men tey vóru ikki so ógvuslig sum tað í Skálafirði.

Eingin fólkaskaði var, sigur løgreglan í Runavík at enda.

# Stolin bilur fór útav



Sveinur Tróndarson

Tá fólk komu til brúnna um Streymin sunnumorgunin, sóu tey ein bil liggja við síðuna av vegnum sunnanvert brúnna, Streymoyarmegin.

Hann var ikki serliga vakur á at líta, har hann lá, við brotnum bakhjóli høgrumegin. Hann hevði eisini aðrar snuddir, og skelti skamt frá bilinum gav ábendingar um, at bilførarin hevði mist tamarhaldið á bilinum og var síðani farin út av vegnum.

Løgreglan mundi kortini hava verið á staðnum, tí bilurin hevði ongar nummarplátur. Men so var ikki. Tá Sosialurin ringdi til løgregluna visti eingin nakað um hetta óhappið.

– Men tað er ikki fyrstu ferð, at eitt óhapp er hent, uttan at vit fáa boð um tað, segði løgreglumaðurin og legði afturat, at ein orsøk til tað kundi vera, at bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka og tí ikki vildi í samband við løgregluna.

Tí ber ikki til at siga, nær bilurin er farin út av, hví og hvussu tað er hent.

Men mánadagin varð gátan um bilin loyst. Á bilasøluni hjá P/F Wenzel í Havn, vóru teir brádliga varugir við, at ein bilur vantaði í túninum, og hesum boðaðu teir løgregluni frá.

– Júmen, so kann tað vera, at tit eiga tann bilin, sum stendur við síðuna av vegnum norðuri við brúnna, segði løgreglumaðurin.

Og so var. Tá stellnummarið á bilinum var kannað, vísti tað seg, at tað var bilurin, sum P/F Wenzel saknaði.

Onkur hevur tískil verið í túninum hjá bilasøluni um vikuskiftið og tikið bilin. Síðani hevur hann koyrt norður gjøgnum Sundalagið til hann hevur mist tamarhaldið á bilinum, og er farin út av vegnum.

Og so er tað kanska lættari at skilja, hví løgreglan einki visti um ferðsluóhappið ...


Vit takka Stjørnuni fyri gott og vælleikandi kappingarár.

Hjartaliga tillukku við føroyameistaraheitinum



Sosialurin - 31820

DAEWOO Í FØROYUM

P/f Esmar Simonsen HØVUÐSSTUÐUL




# Hummaraveiða einki luksuslív

*FISKIVINNA. Skal hummaraveiðan við Føroyar gerast meira enn eitt íkast til útróðurin er loysnin færri loyvi og meira til hvønn bátin. Í dag fæst minni fyri hummaran enn fyri 10 árum síðani og prísgloppið millum toskin og hummaran er minkað stórliga*

Dánjal Højgaard
Myndir: Jens Kristian Vang



*Jóhan Weihe hevur tømt hummararúsurnar fyri seinastu ferð í vetur. Hetta hevur ikki verið tann besta sesongi hesi tíggu árini hann hevur veitt hummara.*

15. apríl er hummaratíðin av fyri hesaferð.

Tá kunnu bátarnir, sum loyna eftir tí reyða marglætisfiskinum gera upp, hvussu sesongin, sum byrjaði í september í fjør, royndist.

Á Norðbúgvanum, sum hevur heimstað á Norðskála, hava teir drigið fyri seinastu ferð í vetur. Kvotan upp á 1.500 kilo og tey 600 kiloini, sum teir hava keypt frá øðrum bátum, eru uppfiskað.

Teir gremja seg ikki um úrslitið hóast hetta ikki hevur verið av bestu hummaraárum.

– Tað hevur verið heldur smáligt í vetur. Men summir hava fingið nógv, sigur Jóhan Weihe, sum eigur Norðbúgvan saman við svágrinum, Jónsteini Dam. Fyri jól var veiðan einki serligt. Frægasti mánaðin var januar og tá fingu teir okkurt um 50 kilo um dagin.

Tað er lítið av miklum.

Fyri fáum árum síðani høvdu hummarabátarnir rokfiskiskap eini tvey ár. Tá vórðu 100 kilo drigin um dagin og tá var kvotan uppi longu eftir tveimum mánaðum.

### Bert eitt ískoyti

Fert tú á matstovu at eta fínt stendur hummarin ovast á matarlepanum. Í Fraklandi, Spania og øðrum londum gjalda fólk fegin tað, sum tað kostar at njóta tann reyða marglætisfiskin, sum teir báðir svágrarnir veiða á Kaldbaksfirði ella Kollafirði.



*Hummarabáturin Norðbúgvin við kei á Norðskála, har eitt virki tekur ímóti hummaranum.*

Men tað eru ikki fiskimenn, sum Jóhan og Jónstein, ið spinna gull av hummaranum . Tað gongur skeivan veg við prísinum og í dag fæst minni fyri hummaran enn tá ið Jóhan byrjaði at veiða hummara fyri 10 árum síðani.

– Prísurin er ongantíð hækkaður. Fyri tíggu árum síðani fingu vit 66 krónur fyri kilo. Nú fáa vit 55 krónur, sigur Jóhan, sum keypti Norðbúgvan saman við svágrinum fyri tveimum árum síðani. Olja skal gjaldast. Báturin skal fíggjast.

– Hetta er gott ískoyti, men tað er einki at liva av. Vart tú einsamallur og hevði ein bíligan bát, so var tað kanska ein meining í tí, sigur hann.

### Gloppið minkar

Eins og fleiri av hinum hummarabátunum, rør Norðbúgvin eisini út.

Hummaarakvotan er einast 1.500 kilo upp á bátin, umframt tey kiloini, bátarnir keypa og selja sínámillum. Tískil kemur tað ikki uppá tal at avsiga góðar útróðrardagar fyri at veiða hummara. Serliga ikki nú várróðurin er í hæddini og toskaprísurin hevur ligið uppi á 23 krónum.

– Tá ið eg byrjaði at veiða hummara var prísurin kanska tíggju ferðir so høgur sum toskaprísurin. Nú er hann er bert hálva triðju ferð toskaprísin, sigur Jóhan. Herfyri var Norðbúgvin sjey dagar á Norðhavninum og bara hesin eini túrurin gav einar 100.000 krónur.

– Hesir sjey dagarnir góvu eins nógv og øll hummarasesongin, sigur Jóhan.

### Færri loyvi

Jónstein Dam heldur, at tað eru ov nógvir bátar, sum hava loyvi at royna eftir hummara. Sum er eru eini 37 loyvi í økinum, har Norðbúgvin roynir. Hetta økið røkkur av Skálafirði norður til brúnna um Streymin. Verða færri loyvi latin verður meira í part, sigur Jónstein.

– Tað áttu at verið færri loyvi, og afturfyri áttu bátarnir at sloppið at sett fleiri rúsur. Tá høvdu teir fingið meira burturúr, sigur hann. Sum er hava hummarabátarnir loyvi at seta 250 rúsur annan hvønn dag.



*Hummarin er misjavnur til støddar. Størsti hummarin fæst inni á firðunum, men har liggja eisini nógvir bátar framvið.*

